| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | 6746.23 |
| **Heiti**<br>***Title*** | Grundskeið í sernámsfrøði - eftirútbúgving<br><br>Special Needs Education: Foundations |
| **ECTS**<br>***ECTS*** | 15 ECTS |
| **Fortreytir**<br>***Prerequisites*** | Lærara- ella námsfrøðingaútbúgving, ella onnur viðkomandi útbúgving á sama stigi, umframt minst 2 ára starvsroyndir í fólkaskúla ella miðnámsskúla |
| **Stig**<br>***Level*** | Bachelor of Education (BEd.). |
| **Endamál**<br>***Purpose*** | Endamálið við skeiðnum er at gera tann lesandi føran fyri at meta um (1) sernámsfrøði sum hugtak, t.e. sum námsfrøðiliga sergrein og sum partur av almennu námsfrøðini (2) sernámsfrøði í verki, við sjóneykuni á ymiskar avbjóðingar, ið krevja sernámsfrøðiligt atlit (3) arbeiðshættir við denti á hættir at arbeiða við sernámsfrøðiligum avbjóðingum. |
| **Innihald**<br>***Content*** | Skeiðið er býtt í 3 høvuðsøki, sum tó eru samanhangandi.<br><br>Økini eru hesi:<br><br>o Sernámsfrøði sum hugtak: námsfrøðilig sergrein og sum partur av almennu skúlaskipanini<br>    o Sernámsfrøðiliga rákið<br>    o Sernámsfrøðiliga økið í Føroyum<br><br>o Sernámsfrøði í verki: avbjóðingar, ið krevja sernámsfrøðilig atlit viðvíkjandi næmingum í:<br>    o Avbjóðandi læriumstøðum<br>    o Avbjóðandi atferð<br>    o Serligum sosialum umstøðum<br><br>o Arbeiðshættir: hættir at arbeiða við sernámsfrøðiligum avbjóðingum<br>    o Serundirvísing<br>    o Næmingalagað undirvísing<br>    o Inkluderandi sernámsfrøði<br>    o Tvørgreinaligt og tvørgeiraligt samstarv |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Vit nýta fyrilestraundirvísing, samstarvslæru, bólkaarbeiði, greining av casum, kjakbólkar, upplegg frá skeiðsluttakarum, stutt skrivlig avrik, sjálvlestur, osfr.. |

| | |
|---|---|
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Við skeiðslok skal tann lesandi megna at greiða frá, skyna ímillum, meta um/taka støðu til, kjakast og hugleiða um:<br><br>• hvat eyðkennir sernámsfrøði sum hugtak, bæði sum námsfrøðilig sergrein og sum partur av almennu skúlaskipanini.<br>• sernámfrøði í verki við støði avbjóðingum í læriumstøðum, atferðarumstøðum og sosialum umstøðum, ið krevja sernámsfrøðiligt atlit.<br>• arbeiðshættum í sambandi við sernámsfrøðiligar avbjóðingar, t.d. serundirvísing, næmingalagað undirvísing, inkluderandi sernámsfrøði og tvørgreinaligt og tvørgeiraligt samstarv. |
| **Próvtøkuháttur**<br>***Assessment method*** | Próvtøkan er tvíbýtt<br><br>(1) Tey lesandi skulu arbeiða við sernámfrøðiligum avbjóðingum í skúlanum, meðan skeiðið gongur og dokumentera, hvussu tey hava skipað arbeiðið og samstarvið frá byrjan til enda. Hetta arbeiðið skal verða góðtikið av undirvísarunum, áðrenn endaliga uppgávan verður skrivað.<br><br>(2) Tey lesandi skulu skriva eina stutta akademiska uppgávu (7-10 blaðsíður), sum tekur støði í einum ella fleiri avbjóðingum, ið eru tengdar at sernámsfrøði í skúlanum. Teksturin skal leggjast fram munnliga. |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Innanhýsis próvdøming |
| **Próvtalastigi**<br>*Marking scale* | Staðið/ikki staðið |
| **Lestrarlisti**<br>*Bibliography* | Bókmentalistin verður latin teimum lesandi, áðrenn skeiðið byrjar |
| **Ábyrgd**<br>*Contact* | Frida Poulsen (fridap@setur.fo) |